# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kreftir í Sambandi vilja amgonguslit ella nýval!

Í grein nevnd "Gamli løgmansflokkurin í politiskum tómrúmi" kemur Magni Laksafoss, tingmaður Sambandsfloksins við sera hvøssum atfinningum til Javnaðarflokkin og serstakliga floksformannin, fíggjarmálaráðharran. Persónligar markeringar eru vorðnar alt meira vanligar. Hví so viðgera atfinningar sambandsmansins? Eru tær áhugaverdar og viðkomandi í einum almennum politiskum høpi? Svarið er, at atfinningarnar eru heilt óvanliga harðar. Tær leggja alla ábyrgd fyri fíggjar- og búskapartrupulleikarnar á Jóannes Eidesgaard einsamallan. Laksafoss finst at fíggjarmálaráðharranum fyri atgerðarloysi og fyri ikki at megna konstruktivar langtíðarloysnir. Her er, sigur Laksafoss, eingin stimbrandi fíggjarpolitikkur, einki initiativ - bert tveir danskir bankapakkar. Funnist verður at sjálvum handverkinum: Fíggjarlógaruppskotið var makkverk, uttan visjónir, uttan raðfestingar og uttan politikk. Loksins verður staðfest, at fíggjarmálaráðharrin hevur slept endanum og sett verður fram krav um, at Javnaðarflokkurin tekur sær um reiggj og fer at reka politikk aftur. Samantikið staðfestir Laksafoss, at Javnaðarflokkurin og formaður hansara eiga trupulleikarnar. Hetta er heilt óvanligur tóni millum samgongufelagar.

Tað, sum er áhugavert við greinini hjá Magna Laksafoss, er tó ikki so nógv tær hørðu atfinningarnar í sjálvum sær, sum tað, ið hesar atfinningar siga um ABC samgonguna. Stevið í sitandi ABC samgongu er vánaligt. Dømini eru mong: Kreppa um Atlantsflog og um fiskivinnupolitikkin, tingmenn, ið hótta við at taka seg úr samgonguni og nú atfinningarnar frá Laksafoss, ið eru so lemjandi, at Javnaðarflokkurin ikki kann lata hetta fara aftur við borðinum, og soleiðis melur klandurskarusellin í kring við alt størri ferð. Tað eru sostatt ikki atfinningarnar sjálvar, men motivið, endamálið og timingin, sum eru áhugaverd. Sjálvt um lagt verður upp fyri hesum, at landsfundur Sambandsfloksins er fyri framman, so má annað og meira liggja sum grund fyri hesum álopi á formannin í samgonguflokki. Tað er okkurt, sum kundi bent á, at kreftir í Sambandsflokkinum stevna móti samgongusliti, ja kanska enntá móti nývali. Vit skulu bara okkum fyri at gita um orsøkirnar. Hinvegin slepst ikki uttanum at ásanna, at hetta kann eingin samgonga halda til. Síðan í vár hava vit eftirlýst einum virknum kreppupolitikki. Men einki hendir. Her eru vit fyri so vítt samd við Laksafoss. Men er tað rættvíst at geva fíggjarmálaráðharranum og flokki hansara alla skyldina? Tað halda vit ikki. Í øðrum londum eru tað fyrst og fremst búskapar- og vinnumálaráðini, síðan øll stjórnin, ið hava ábyrgdina av kreppufyribyrgjandi politikkinum. Hesi málsøki eru ábyrgd Sambandsfloksins og í øðrum lagi ábyrgd hjá allari samgonguni. Løgmaður má nú stíga í karakter sum leiðari og fáa samgonguna at fungera ella má hann taka avleiðingarnar. Kreppan stendur við og versnar. Samfelagið tolir ikki framhaldandi klandur og atgerðarloysi.

**Sosialurin**

## Tann gloymdi sannleikin

**SOFUS DEBES JOHANNESEN**



Tað sýnist, sum at av og á kemur ein uppfunnin sannleiki upp um nógv umrødda lásamálið, sum bert hevur eittans endamál og tað er at gera Høgna Hoydal til ein pínsluvátta, meðan undanfarni løgmaður Jóannes Eidesgaard er skurkurin.

Men var nú alt soleiðis, sum bæði "tjóðveldismaskinan" og partar av fjølmiðlunum lýsa málið? Kann tað ikki hugsast, at onkur ósvaraður spurningur liggjur og skrýggjar eftir einum svari?

Uttan mun til, hvussu Tjóðveldi og formaður teirra Høgni Hoydal saman við sínum "disiplum" og pørtum av fjølmiðlunum royna at kvala ella fjala sannleikan, so kemur hann tó at liva longst.

Tí hesar stuttu og ítøkiligu viðmerkingar:

Sum løgmaður hevði Jóannes Eidesgaard fult málsræði á ognunum í Tinganesi mótvegis Løgtinginum og fíggjarlógini og sambært Kunngerðini um Málsøki. Hetta er staðfest í løgfrøðiligari niðurstøðu!

Avtalan millum Høgna Hoydal og Jóannes Eidesgaard varð uppsøgd bæði munnliga og skrivliga. Hetta er somuleiðis løgfrøðiliga staðfest!

Hvørki Løgmansskrivstovan ella tásitandi løgmaður boðsendi lásasmiði úr býnum at koma og bróta eitt lás upp á landsins ognum 1. sept. 2008. Hesin var boðsendur av Uttanríkisráðnum!

Tann, sum síðan skifti oyðilagda lásið á skrivstovuni úr aftur og fekk viðurskiftini í lagi, var húsavørðurin hjá Løgmansskrivstovuni sum partur av hansara vanliga og lógliga yrki.

Hvørki Løgmansskrivstovan ella tásitandi løgmaður boðsendi einum heilt øðrum lásamiði, at koma náttina til 5. sept. 2008 og fyri aðru ferð at bróta inn á somu skrivstovu og skifta lásið út! (Áhugavert hevði verið, um fjølmiðlar og onnur áhugaði funnu fram til, hvør hesin lásasmiður var, og hvaðar hann sendi rokningina)!

Hesar báðar hendingar áttu uttan iva at verið sendar løgregluni, so høvdu vit sloppið undan allari hesari øsingini frá Tjóðveldinum.

Alt annað, sum er sagt í hesum máli, kann kanska vera undirhaldand fyri summi, men omanfyri nevnda er tað, sum alt snøgt sagt snýr seg um, soleiðis sum eg havi skilt tað!

Onki er at ivast í, at hetta mál hevur avdúkað muruna hjá politisku leiðsluni í Uttanríkisráðnum hesa tíðina, og hetta málið hevur helst fingið táverandi løgmann at síggja formann Tjóðveldisins í sínum rætta ljósið, soleiðis at fylgjan gjørdist tann, hon nú einaferð gjørdist: Dropin, sum fekk bikarið at flóta yvir!

Vit hava eina pressu, sum í tíð og úrtíð breggjar sær av sínum dugnaskapi, og tað undrar tí mangan, hví teir ongantíð hava ómaka sær at finna substansin í hesum máli, men áhaldandi frambera hetta við orðunum hjá Høgna Hoydal.

Eingin ivi er um, at Høgni Hoydal man eiga bróðurpartin av orsøkini til, at "Várið í Pragh" gjørdist so stutt!

## Jógvan man minnast skeivt...

**HØGNI HOYDAL**



**Jógvan við Keldu vil vera við, at undirritaði hevur verið "unfair" í míni lýsing av útlendingamálum í Føroyum síðani 2004**

Sjálvur kýtti eg meg fyri at vera so diplomatiskur sum gjørligt í míni orðing um ta fullkomnu fløkju og tað rættarloysi, sum tók seg upp meðan Jógvan við Keldu var landsstýrismaður á økinum.

Tó skal eg vátta, at Jógvan við Keldu átti ikki einsamallur ábyrgdina av skilinum. Honum varð álagt av táverandi løgmanni og landsstýri at umsita hesi mál á ein hátt, har munur skuldi gerast á fólki og har rættartrygg umsiting mátti lúta fyri politiskum kannustoyparíi í ABC-samgonguni. Avleiðingarnar av hesum liva vit við enn í dag.

Jógvan man eisini minnast skeivt, tá hann heldur uppá, at Fútin skal hava verið í sambandi við hann um umsitingina av útlendingamálum, og at hann skal hava sett á stovn eina serliga skrivstovu til at taka sær av at rudda upp í útlendingmálum eftir undanfarna landsstýrismann – eitt nú í sambandi við tey teilendsku fólkini, ið vórðu illa viðfarin og undirlønt.

Tvørturímóti var støðan hon, at arbeiðsloyvi vórðu fram til seint í 2003 umsitin hjá Vinnumálaráðnum, har partamaður Jógvans, Bjarni Djurholm, ráddi fyri borgum. Fútin setti seg í samband við meg, sum umsat uppihaldsloyvi, til tess at fáa skil á økið. Og tá vórðu arbeiðsloyvini flutt frá Vinnumálaráðnum til Løgmálaráðið, og m.a. málið við teilendingunum greitt.

Eisini var arbeiðið at taka útlendingamál á føroyskar hendur liðugt í desember 2003 og avtalur klárar við danskar myndugleikar um skilagóðar skipanir.

Alt hetta varð støðgað undir fyrru ABC-samgonguni. Og restin er hurlivasi....

W W W . S O S I A L U R I N . F O


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.